# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Persónliga hevði eg viljað fingið eitt arbeiði vegna førleika mín.*

*Krúnprinsessa Victoria um kynskvotubýti*

Jógvan Zachariassen:

## Luttekur á størsta gospeltónleikatiltaki í Skotlandi



Komandi leygarkvøld og sunnukvøld (24. og 25. juni) skal fagottleikarin og prædikumaðurin Jógvan Zachariassen í Hoyvík framføra á stórari konsert í Glasgow í Skotlandi.

"Praise Gathering" er tað størsta gospeltónleiktiltakið í Skotlandi, har uml. 330 sangarar og tónleikarar luttaka. Væntandi vera uml. 4000 fólk til konsertirnar.

Jógvan er boðin við sum solistur og fer at framføra norðurlenskar sálmar og fólkaløg á fagottini. Jógvan er kendur sum fagottleikari í Aldubáruni og við solofløgum sínum "Making Melody" og "Faith."

Jógvan er eisini prædikumaður og leiðari í samkomuni Lívdini í Hoyvík. Í hesum sambandi er hann boðin at vera høvuðstalari á konsertini. Soleiðis fær Jógvan møguleikan at samantvinna tað, sum hann elskar mest – tónleik og Orð Guds.

## Rúni fyrsti stjórnmálafrøðingur á setrinum

**Talan var sum eina søguliga stund á Fróðskaparsetrinum fríggjadagin, tá Rúni Rasmussen, sum tann fyrsti á setrinum, kundi prýða seg við titlinum M. S. Sc. í stjórnmálafrøði.**

SKÚLI

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*




*Rúni Rasmussen er fyrsti stjórnmálafrøðingur á Fróðskaparsetrinum*

Frammanundan er Rúni ikki bert B.S.Sc í stjórnmálafrøði, men hevur eisini B.A. í søgu, so hann hevur eina holla og breiða útbúgving.

Rúni fekk 11 í meistararitgerðini, sum bar heitið »Politisk ástøði og valdsbýtið – ein komparativ greining«.

Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum, fegnaðist sjálvsagt um fyrsta stjórnmálafrøðingin og segði millum annað í røðu síni, at hvøkkurin, vit øll fingu av Pisa, var góður:

– Tað er gott við einum hvøkki av og á, tí tað fær okkum at hugsa, at broyta vanar og at skifta kós. Landsstýrismaðurin hevur sett eina nevnd at gera eitt uppskot til lóg um samansjóðaðar lærustovnar í Føroyum. Eg eri sannførdur um, at ætlanin um at skipa fyri hægri útbúgving í Føroyum í eina hægri eind er eitt risastig rætta vegin og fer at skapa fleiri góðar møguleikar, tá talan er um útbúgving og gransking. Men vit eiga ikki at bíða ov leingi, segði Jóan Pauli Joensen.

– Tað er sjálvandi gott at koyra gjøgnum tunlar um alt landið. Men tunlar eru ikki bert framtíðin. Eisini eiga vit at seta íløgur í vitan og kunnleika til okkara ungdóm. Tað er okkara størsta tilfeingi.

– Tað er ein global kapping í øllum heiminum um at fáa teir bestu studentarnar, lærararnar og granskararnar. Vit eru nú við í kappingini, men fáa vit ikki skjótt eitt betri umhvørvi til studentarnar at liva og virka í, vikna vit í kappingini, segði Jóan Pauli Joensen eitt nú í røðu síni.

## Rói Sigvardsen fingið virðismikla heiðursløn



Seinnapartin í gjár fekk Rói Sigvardsen eina virðisløn á 30.000. krónur handaða frá danska tryggingarfelagnum Danica. Rói fekk virðislønina fyri høvuðsuppgávuna hjá sær, sum hann gjørdi, tá hann varð liðugur sum cand.merc. aud. Uppgávan hjá Róa var um "XBRL og Revisjón".

Virðislønin frá Danica varð handað fyri fyrstu ferð í 1992. Rói er fyrsti føroyingur, sum hevur fingið virðislønina.

28 ára gamli Rói býr í Danmark saman við familjuni sær. Hann er giftur við Honnu Sigvardsen. Og saman eiga tey tvey børn – Jóhannus og Rakul.

**- horsdal**

Tekniski Skúlin, Klaksvík:

## Prógv sum elektrikarar og maskinsmiðir





Fríggjadagin 16. juni fingu tríggir elektrikarar og átta maskinsmiðir prógv á Tekniska Skúla í Klaksvík.

**Elektrikarar**, f.v.: Sverri Jacobsen, Syðrugøtu (ElTalvuvirkið) Frank Joensen, Klaksvík, (Einar Mortensen), Sigmundur Joensen, Kambsdalur, (JT-Elektric)

**Maskinsmiðir**, f.v.: Johan Joensen, Klaksvík, (Pomek), Jákup Johannes Dalsá, Fuglafjørður, (KJ-Hydraulik), Antines Poulsen, Klaksvík, (KJ-Hydraulik, Petur Súni Jacobsen, Leirvík, (Skipasmiðjan á Skála), Allan Váðklett, Klaksvík, (Klaksvíkar Sleipistøð), Sandy í Lambanum, Fuglafjørður, (KJ-Hydraulik), Johannes Asbjørn Weihe, Søldarfjørður, (Skipasmiðjan á Skála), og Ragnar Høgnesen, Leirvík, (Skipasmiðjan á Skála).